Tróndur kundi tikið støðu tá

So hevði ikki borið til hjá Havnar kommunu at arbeitt við flogvallaætlanum, siga tveir bygdarráðslimir í Kirkjubøar Sóknar kommunu

8. desember var ein grein í Sosialinum, har Tróndur Patursson segði sína meining um ætlanina at gera flogvøll á Glyvursnesi. — Vitleyst at byggja nýggjan flogvøll, var yvirskriftin.

Bygdarráðslimirnir í Kirkjubøar Sóknar kommunu Helma Frýdal og Elsa Patursson eru samdar við Trónd, men tær halda tað vera eitt sindur jánkasligt av honum nú at stiga fram. Hevði Tróndur í rættari tíð tikið støðu ímóti flogvøllinum, so bar ikki Havnar kommunu til at fyrireika flogvøllin.

21. juni 1986 atkvøddi Tróndur Patursson fyri samstarvsavtalu við Tórshavnar kommunu, men tá uppskot til kommunalt felag at reka flogvøll á Glyvursnesi varð lagt fram fyri bygdarráðið 27. juni 1986, atkvøddi Tróndur Patursson hvørki fyri ella ímóti. Tveir bygdarráðslimir vóru fyri og tveir ímóti.

— Í hálvt annað ár hava vit onga støðu havt í hesum máli, tí Tróndur hevði ta avgerandi atkvøðuni, og tað halda vit ikki, bygdarráðið kann liva við. Hevði Tróndur í staðin atkvøtt ímóti saman við okkum, høvdu Havnar borgarar verið spardir fyri fimm mió. krónur í skattapeningi, siga Helma Frýdal og Elsa Patursson.

Helma og Elsa hava eisini eina viðmerking til onnur enn Trónd:

— Vit halda tað vera framligt, at valevni í Havn brúktu Glyvursnes og útstykking á Velbastað sum valagn. Markið millum Havnar kommunu og Kirkjubøar sóknar kommunu er sum kunnugt Sandá, siga Helmá Frýdal og Elsa Patursson.

randi

Tróndur vildi ikki taka støðu, tí fyrst skuldi Landsstýrið viðgera og samtykkja samstarvssáttmálan, segði Tróndur, sum tá eisini var úti og tosaði við Lassa Klein, landsstýrismann

300.000 til Ólastovu

Føroya Forngripafelag fær eisini stuðul úr býráðnum. Býráðið samtykti hóskvøldið at veðhalda fyri láni upp á 300.000 krónur, treytað av loyvi úr landsstýrinum, til Forngripafelagið. Pengarnir skulu brúkast til at seta Ólastovu í stand.

Føroya Forngripafelag søkti eisini um stuðul til at seta húsini á Krákusteini í stand, men býráðið biðar við at taka støðu til ta umsóknina, til arbeiðið er gjørt.

randi

Fleyr og Kyndil stuðlað

Tórshavnar býráð samtykti eisini at lata 30% stuðul til hondbóltsfelagið Kyndil og flogbóltsfelagið Fleyr, sum hava innrættað felagshøli í Gundadalshøllini. Tey 30%-ini í stuðuli verða roknað av endaliga kostnaðinum hjá Kyndli, sum er 290.000 krónur, og hjá Fleyr 280.000 krónur.

Stríðsárini 4

Fjórða bókin í bestseljararøðini um stríðsárini. Hópurin av forvitnisligum frágreiðingum um tilburðir undir krígnum. Og nógv av tí hevur ongantíð verið frammi fyrr.



NÝGGI BÓKHANDIL
á Káta Horninum - tlf. 12888

Niels Juel Arge

Aftur og fram 88/89

Fyrsta árbók um alt millum himmal og jørð í farna ári á føroyskum. Bókin er fjølbroytt — sett upp í stuttum lættlesiligum brotum — og prýdd við 282 myndum, harav nógvar eru í litum.

Finnbogi Ísakson

Aftur og fram 88/89

NÝGGI BÓKHANDIL
á Káta Horninum - tlf. 12888

Finnbogi Ísakson

Frá snørisfiski til alilaks

Rithøvundurin brúkar ein lættan og greiðan stíl í hesi søgufróðu bók, har hann greiðir frá Føroya Fiskasølu og menningini av fiskivinnuni í Føroyum 1948-88. Bókin er prýdd við 200 myndum — harav helvtin er í litum.

NÝGGI BÓKHANDIL
á Káta Horninum - tlf. 12888

Jógvan Arge